# SPILDURNÝTT • SPILDURNÝTT •



Vistfrøði, bundið og ullint ganga upp í eina hægri eind við klassisku brúkslutunum frá **Sirri**. Sum altíð, lekrir mótsetningar til modernaða, stílreina ella romantiska stílin í føroyskum heimum. Teppir, pútir og plaidar fyri millum 395 og 1095 krónur.



## Festligt frá teimum bestu í Svøríki

Litríka PXL borðlampan úr lakeraðum aluminiumi og metali er frá svensku lampufyritøkuni Zero, sum er millum tær fremstu í norðurlondum. Lampan kostar umleið 8.000 krónur og er millum annað at fáa á www.boshop.dk

## Barnabaðikar vann designvirðislønina

Barnabaðikarið The Flexi Bath frá donsku fyritøkuni Play for Life ApS vann Formland Design Award – Spring 2009 á Formland-messuni í Herning herfyri. Í grundgevingini segði dómsnevndin soleiðis: The Flexi Bath hevur eina wow-effekt. Hetta er eitt gott dømi um, hvussu vit kunnu loysa ítøkiligar trupulleikar við at brúka gott design. Flestu barnafamiljurnar kenna til, at baðikarið hjá teimum smæstu fyllir ov nógv. Hetta hevur Play for Life ApS nú funnið eina einfalda og skilagóða loysn upp á, tí karið kann leggjast saman, tá tað ikki er í brúki. Eisini skiftir proppurin í botininum lit, um vatnið verður ov heitt. Baðikarið er stuttligt og spennandi á at líta, litríkt og í einari príslegu, har øll kunnu vera við. Fæst fyri umleið 270 krónur.



## Feitt mini-funkis







Nú kunnu øll fáa sær eitt lekkurt funkishús á tremur við designaramøblum í lutfallinum 1:16.

Húsið er eitt fullkomið kopi av húsinum hjá danska sniðgevanum Arne Jacobsen í Charlottenlund. Fyritøkan Minimii frá Hellerup hevur gjørt húsið, við loyvi frá familjuni hjá Arne Jacobsen.

Funktionalisman, sum gjørdi um seg í 30'unum, eisini her heima, er brúkaravinarlig og eyðkend av reinum linjum við ongum pynti.

Minimii framleiðir smá kopi av veruligum húsum, møblum, list og innrætting, við tí fyri eyga at geva børnum vakrar dygdarleikur, sum eisini lærir tey at virðismeta gott design. Millum annað Eggið, Svanan og Sjeyarin frá Fritz Hansen og eitt spísiborð. Húsið, sum fæst frá 1. mai 2009, kostar umleið 3.200 krónur, og kann bíleggjast longu nú frá www.minimii.com.

SPILDURNÝTT • SPILDURNÝTT •